# Heðin umhugsar tingsess




**Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sigur seg hava fingið fleiri áheitanir frá javnaðarfólki um at stilla upp til løgtingsvalið, sum verður í seinasta lagi í januar 2008. Sjálvur hevur hann ikki tikið støðu, men hann váttar, at hann hevur hug til tingarbeiði.**

**Heðin Mortensen stillaði upp til seinasta løgtingsval á sambandslistanum, men kom ikki inn. Hann hevði tó verið tingmaður í dag, um hann hevði fingið sama atkvøðutal á javnaðarlistanum. Sostatt er líkt til, at kappingin verður hørð um tingsessirnar hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Heðin Mortensen hevur hug at verja høvuðsstaðin á Tingi. - Ágangurin er øgiligur, sigur hann*

Tingsetan er farin at halla, og eftir ætlan verður síðsti tingfundur í hesi setuni tann 3. mai. Løgmaður hevur boðað frá, at hann hevur sett merki við 19. januar 2008 í álmanakkanum, tí tá ætlar hann, at løgtingsval skal vera.

Sostatt skulu tey lokalu valfeløgini skjótt fara at umhugsa, hvørjar kandidatar tey skulu stilla upp til valið og hvussu tey skulu brynja seg til eitt komandi valstríð.

Í fleiri valdømum hevur longu verið frammi, at ávísar broytingar kunnu væntast næstu ferð, tá veljarin skal seta kross á atkvøðuseðilin. Okkurt valfelag hevur boðað frá, at javnstøða skal verða á teirra lista, meðan tað meira enn so kemur fyri, at tingfólk siga seg umhugsa støðuna.

Sosialurin hevur loddað eitt sindur í tí politiska dýpinum, nú í mesta lagi tríggir ársfjórðingar eru eftir til valið.

Í Suðurstreymoy kann borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen vátta, at fleiri fólk - bæði privatfólk og kreftir í Javnaðarflokkinum – hava heitt á hann um at stilla upp til løgtingsval.

Enn er tó eingin áheitan komin frá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag um at stilla upp, sigur Heðin Mortensen, og sjálvur sigur hann, at hann ikki hevur tikið støðu, um hann møguliga fer at taka av eini tílíkari áheitan.

## Ágangur á høvuðsstaðin

- Men Havnin manglar eina góða rødd, tí ágangurin er øgiligur. Forstáilisi er ikki nóg gott.

- Nú ræður um at verja borg, sigur borgarstjórin í Havn, tá talan er um at velja tinglimir næstu ferð.

Heðin Mortensen metir, at tað verður ov tosað nógv um tað negativa heldur enn at byggja upp, og tí heldur hann tað vera neyðugt Havnin og Suðurstreymoy fáa betri kor.

- Tá Havnin hevur tað gott hava bygdirnar tað gott, sigur Heðin Mortensen og leggur dent á, at allir føroyingar eiga høvuðsstaðin.

*– Tað ljóðar, sum tú hevur hug at stilla upp?*

- Ja tað havi eg, sigur Heðin Mortensen.

## Tøtt kapping

*Men kann tað ikki verða tronligt á lista C í Suðurstreymoy næstu ferð?*

- Ja, tað veit eg ikki, tað er møguligt, men hvat er tronligt? Tað ræður um at gera vart við seg, sigur borgarstjórin og leggur dent á, at hetta kemur veljarin at gera av.

Heðin Mortensen stillaði upp til seinasta løgtingsval í 2004 fyri Sambandsflokkin. Tá fekk hann 398 atkvøður, men kom ikki inn á ting, av tí at hetta bert rakk til eitt triðja pláss á Sambandslistanum – hetta eru 18 fleiri enn tær 380 atkvøðurnar, ið John Johannesen fekk, og sum var nóg mikið at tryggja honum annaðplássið á javnaðarlistanum í Suðurstreymoy og harvið ein umdømisvaldan tingsess.

Nú er Heðin Mortensen limur í Javnaðarflokkinum, og tí kann tað gerast spennandi, um Suðurstreymoyar Javnaðarfelag velur at stilla Heðin Mortensen upp hesaferð.

Til valið í 2004 fekk Kristian Magnussen flest javnaðaratkvøður í Suðurstreymoy – hann fekk 412 atkvøður, sum vóru 14 fleiri enn Heðin Mortensen. Síðani komu John Johannesen, ið sum nevnt fekk 380 atkvøður, Helena Dam á Neystabø við 341 atkvøðum, og Katrin Dahl Jacobsen, ið 308 fólk valdu at geva sín kross.

# Tingskipanin broytast

**Á tingfundinum í dag skuldi tingið velja eina nevnd, ið skal viðgera eitt broytingaruppskot til tingskipanina. M.a. skulu fleiri málsligar broytingar gerast. Ætlanin er at, at fleiri heiti skulu verða brúkt í hvørkikyni, sum verður mett at borga fyri meira javnstøðu**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Nú skal meira javnstøða hómast í orðavalinum í Tingskipanini*

Nú skal javnstøðan verða sjónligari í orðatilfeinginum í tingskipanini. Orð sum "tær konur og teir menn" skulu skiftast út við "tey", og heldur enn at brúka orðingina ""elsti maður ella elsta kona" skal "elsta fólk" brúkast.

Talan er um eitt broytingaruppskot, sum Edmund Joensen, løgtingsformaður, hevur áður lagt uppskotið fyri Tingið. Hetta uppskotið varð beint í eina sokallaða §25 nevnd. Ein slík nevnd verður upployst, tá hon er liðug við sítt arbeiði, men av tí at ein minniluti kravdi málið aftur fyri tingið, skal ein nýggj §25 nevnd veljast, og hetta skuldi gerast á tingfundinum í dag.

Edmund Joensen sigur við Sosialin, at tingskipanir á, og at talan ikki er um nakra kollvelting, men heldur um eina dagføring. Hetta er triðju ferð, at Tingið fer at broyta tingskipanina. Orsøkirnar til slíkar broytingar kunnu verða nógvar, m.a. broytast tær tøkniligu fortreytirnar at nógv, nú teldurnar ávirka arbeiðið alt meira.

## Málsligar broytingar

Tær málsligu broytingarnar eru m.a., at ætlanin nú er, at Tingskipanin bara skal eita Tingskipanin ístaðin fyri tað núverandi Tingskipan Føroya Løgtings, ið verður mett at vera ein dupultorðing.

Edmund Joensen dylur heldur ikki fyri, at tað er við javnstøðu í huganum, at málsligar broytingar verða gjørdar um kynini, og at so nógv hvørkikynsorð skulu brúkast sum gjørligt um tinglimirnar. Tinglimirnir verða tó framvegis kallaðir løgtingsmenn, av tí at tað hevði kravt eina broyting í Stýrisskipanini at broytt hetta heitið, og tað skulu tvinni løgting verða við til at samtykkja.

Sostatt skulu hvørkikynsheitini serliga brúkast, áðrenn tingfólkini eru vald, tvs. at skotið verður upp, at brúka heitini "tey" ella fólk" heldur enn konur og menn, tá nývaldu umboðini koma í tingið at góðkenna valbrøvini. Tá valbrøvini eru góðkend, og tey valdu taka sæti á tingið, er heitið framvegis løgtingsmaður, sum Stýrisskipanin ásetir.

Aðrar málsligar broytingar í broytingaruppskotinum hjá løgtingsformanninum til Tingskipanina eru m.a., at heitið skrivstovustjóri verður broytt til stjóri, og Løgtingsskrivstovan skal sambært uppskotinum kallast Umsiting Tingsins í framtíðini.

## Tingfólk tosa úr egnum sessum

Eisini sæt ymist í uppskotinum, ið ber boðm um nýggjar tíðir. M.a. verður spurnartekn við um tað er neyðugt at lýsa alment við tingfundum. Í viðmerkingum til §32 í broytingaruppskotinum verður sagt soleiðis: "Við nýggju kunningartøknini verður mett, at tíðin er við at fara frá at lýsa tingfundir alment, hinvegin er einki til hindurs fyri, at hetta framhaldandi verður gjørt, um tað verður mett neyðugt".

Eisini verður borið upp á mál, at tingmenn møguliga skulu hava møguleika at røða frá sínum sessi í tingsalinum. Í viðmerkingunum til hesa grein verður sagt at "endamálið við hesum uppskoti er at geva formanninum heimild at víðka um møguleikan hjá tingmanni at tala úr sætinum. Í londunum kring okkum er tað vanligt, at stuttar viðmerkingar verða gjørdar úr sætinum. Tað er í løtuni ikki ætlanin at broyta galdandi skipan, men gevur henda broytingin møguleika fyri hesum, uttan at tingskipanin skal broytast aftur. Slík skipan krevur eisini, at mikrofon er á hvørjum borði".

Vantandi verða fáa allir flokkar í Tingi hvør sítt umboð í nevndina. Harumframt verða teir fýra tingmenninir í formansskapinum umboðaðir í nevndini.